HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. + 298 35 64 01
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD, VETERINARY AND ENVIRONMENTAL AGENCY

# Matvørudeildin lýsir eftir málsviðgera við náttúruvísindaligari útbúgving

Søkt verður eftir akademikara at arbeiða á matvørudeildini á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

**Arbeiðsuppgávurnar**
Arbeiðsuppgávurnar fevna um alt vanligt virksemi, sum gongur fyri seg á matvørudeildini, so sum

- Málsviðgerð
- Eftirlit á fiska- og matvøruvirkjum
- Skoðan av innaneftirlitsskipanum
- Fakligar metingar og ráðgeving
- Annað

**Serliga økið starvið fevnir um er:**

- Góðkenning og løggilding av matvørureindum íroknað løggilding av feskfiska-, verksmiðju- og frystiførum
- Málsviðgerð í sambandi við góðkenning av innaneftirlitsskipanum

**Krøv til útbúgving og førleika**
Akademiskt prógv á kandidat ella BSc. støði innan náttúruvísindi so sum matvørufrøðingur, djóralækni, Cand. Scient ella tilsvarandi útbúgvingar frá hægri lærustovnum.

Umsøkjarar við viðkomandi starvsroyndum hava fyrimun.

Vit sóknast eftir fólki við áræði og framfýsni at náa settum málum og sum

- megnar at vísa og fasthalda yvirlit í eftirlitsarbeiðinum og tá á leikar
- sær nýggjar arbeiðsuppgávur sum eina spennandi avbjóðing
- kanst arbeiða sjálvstøðugt, men samstundis verða liðleikari
- dugur væl at samstarva
- hevur góð evnir at samskifta við onnur bæði í skrift og í talu
- hevur koyrikort til bil
- hevur kunnleika til framkomnar edv-skipanir

**Vit bjóða**

- Spennandi og sjálvstøðugt arbeiði á eini deild við engageraðum starvsfólki í einum tvørfakligum arbeiðsumhrøvi
- Eitt arbeiði í samstarvi við vinnuna og aðrar myndugleikar
- Nýggja avbjóðingar
- Støðuga førleikamenning
- Gott arbeiðsumhvørvi

**Tíð og setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv, og verður sett sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið, sí www.lnd.fo Umsóknir við avriti av prógvi, CV, viðmælum o.t. skulu vera Starvsstovuni í hendi í seinasta lagi 20. september 2006.

**Stutt um matvørudeildina:**
*Á Matvørudeildini starvast íalt 10 fólk. Deildin tekur sær av:*

- *góðkenning av og eftirlit við matvøruvirkjum (íalt er talan um eini 600 góðkenningareindir)*
- *inn- og útflutningni av matvørum*
- *fakligur ráðgevi í kunngerðararbeiði*
- *yvirvøku- og annað eftirlitsarbeiði*
- *veterinerum uppgávum, sum nattúrliga hoyra til á matvørudeildini.*

Lýsingin er eisini at síggja á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hsf.fo

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Óluvu Niclasen, deildarleiðara, tlf. 356433 ella Bárð Enni, stjóra, tel. 356400.

STARVSLÝSING

# Elektrikari

**Søkt verður eftir dugnaligum og álitandi elektrikara til maskinmiðstøðina í Kollafirði. Maskinmiðstøðin hevur um hendi viðlíkahald av entreprenørmaskinum hjá Landsverki og høvuðsgoymslu av eykalutum og amboðum, herundir innkeyp og viðlíkahald av hesum.**

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um viðlíkahald og umvæling av el-útbúnaði á skervverkum og asfaltverki o.ø. hjá stovninum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava útbúgving sum elektrikari ella aðra viðkomandi útbúgving.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmálanum ímillum avvarðandi yrkisfelag og Føroya Handverksmeistarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir verða at senda til:

Landsverk
Postsmoga 78
FO-110 Tórshavn

og skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 12. september 2006. Merkið brævbjálvan „Umsókn handverkari“. Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jóan Petur Patursson, rakstrarleiðara, á tel 540 950.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

NÝTT SKEIÐ

# PILATES & SLIMLIFT



VEKTKONTROLL

**AEROBIC- INSTRUKTØR GUÐRUN MALENA HANSEN**
er útbúgvin Pilates-instruktør & Aerobic- instruktør og hevur undirvíst í Føroyum og í Danmark

**Halda áframm 6 vikur í Losjuni í Gøtu**
***Øll eru vælkomin. Kostnaður 500 kr. fyri alt skeiðið***

***Hetta er fyri allar aldursbólkar***

Byrja mánadagin 4. september kl. 19.00
hvørt mánakvøld 6 vikur fram
Seinasta freist at gjalda er 3. september

Tel 442166 / 273164

**Vit síggjast til ein sunnan lívsstíl**



zarepta

Mansstevna verður í døgunum 8.-10. september 2006

Allir menn eru vælkomnir

**Tekning í Zarepta tlf. 332140**

veitst tú ikki tað?

Sosialurin

# Hús til sølu

Hús, Giljavegur 20 í Sandavági til sølu um nøktandi boð verður givið. Ný ístandsett. Hugnalig og liggja væl fyr. Kjallari + 1 hædd.

**Tlf. 210535 millum kl. 18.00 og 18.30 gerandisdagar**